# Kunngerðablaðið A

2021

Givið út 14. mai 2021

Nr. 80

13. mai 2021

**Kunngerð um broyting í kunngerð um ókeypis koppseting ímóti COVID-19**
(Tilboð um ókeypis koppseting til persónar við fyribils uppihaldi í Føroyum)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 183 frá 18. desember 2020 um ókeypis koppseting ímóti COVID-19, sum broytt við kunngerð nr. 2 frá 12. januar 2021, kunngerð nr. 22 frá 10. mars 2021, kunngerð nr. 25 frá 26. mars 2021 og kunngerð nr. 38 frá 21. apríl 2021, verða í § 1 sum stk. 2 og 3 sett:

"*Stk. 2.* Persónar, sum uppihalda sær fyribils í Føroyum í minsta lagi 30 dagar, eru eisini fevndir av tilboðnum um ókeypis koppseting sambært stk. 1. Hesi hava rætt til tilboð um koppseting frá tí, tey hava verið í Føroyum í 14 dagar. Tilboðið er tó ikki galdandi, um mett verður, at einasta endamálið við uppihaldinum er koppseting.

*Stk. 3.* Føroyingar, ið eru undir útbúgving uttanlands, eru undantiknir kravinum um uppihald í Føroyum í 14 dagar."

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Heilsumálaráðið, 13. mai 2021

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Turid Arge (sign.)